## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Føroya Sparikassi, Sandur:

# Móttøka fyri nýggja deildarleiðaranum

**Eyðvør Dam tók 1. februar 2004 við sum nýggjur deildarleiðari hjá Føroya Sparikassa í Sandoy. Eftir at deildin í Skopun letur aftur í dag, verður bert ein deild í oynni**

Í sambandi við at Eyðvør Dam í Húsavík er sett sum nýggjur deildarleiðari á deildini hjá Føroya Sparikassa í Sandoy, var móttøka á deildini mikudagin 11. februar.

Móttøkan var almenn, og nógv fólk nýttu høvið at støkka inn á gólvið.

Eyðvør tók við eftir Sverra Mohr Edvinsson, ið herfyri fór í annað starv hjá Føroya Sparikassa.

Eyðvør er 41 ára gomul og hevur starvast í Sparikassanum síðan 1. juni 1984. Hon hevur skrivstovu- og sparikassaútbúgving og er eisini farin undir Finansiel Videreuddanelse.

Deildin á Sandi lat fyrstu ferð upp í 1971 við Eyðun Viderø sum deildarleiðara. Eisini hava Jóan Petur Vest, Jónsvein Mortensen og Sverri Mohr Edvinsson verið deildarleiðarar. Umframt deildarleiðaran eru trý onnur starvsfólk á deildini.

Eina tíð vóru fýra deildir í oynni. Umframt deildirnar á Sandi og Skopun hava eisini verið deildir í Skálavík og Húsavík. Tá deildin í Skopun í dag letur aftur, verður deildin á Sandi fyri viðskiftafólkini í allari oynni.



*Eyðvør Dam er sett sum deildarleiðari hjá Føroya Sparikassa í Sandoy. Fyrrverandi deildarleiðarin, Sverri Mohn Edvinsson, hevur tikið við øðrum starvi í sparikassanum*
*Mynd: Oskar Oskarsson*



*Nógv fólk stukku inn á gólvið hendan dagin, hesir eru: f.v. Hanus Clementsen, Sverri Mohr Edvinsson, fyrrverandi deildarleiðari, Eyðfinn Dam, maður nýggja deildarleiðaran, og Evald Sólvitsson*
*Mynd: Oskar Oskarsson*



*Bjarni Olsen, stjóri í Føroya Sparikassa, heldur røðu í samband við deildarleiðaraskifti*
*Mynd: Oskar Oskarsson*

**Hús til leigu**

Vegna eitt av starvsfólkum okkara við familju søkja vit eftir einum húsi í Tórshavn at leiga frá 1. april 2004.

Húsini skula vera í minsta lagi 120 m², í góðum standi og klár at flyta inn í.

Hava tygum eini hús til endamálið, eru tygum vælkomin at ringja til SMS, tel 313041 og spyrja eftir Niels Mortensen.

ISS Føroyar

Postboks 1059 • 110 Tórshavn • Tel 313041 • Fax 317434



*Millum tey sum lýða á meðan Bjarni Olsen heldur røðu eru fyrrverandi og núverandi deildarlaiðarin*
*Mynd: Oskar Oskarsson*



## UTTAN ÚR HEIMI

# Afghansku kvinnurnar verri umstøður nú enn undir Taliban



*Hamid Karzai, forseti, hevur einki gjørt fyri at bøta um korini hjá afghansku kvinnunum, sum tvørturímóti eru verri enn undir Taliban-stýrinum*
*Mynd: Reuters*

**Kvinnurnar í Afghanistan vórðu illa kúgaðar undir Taliban-stýrinum, men umstøður teirra eru uppaftur verri nú**

MANNARÆTTINDI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tá Taliban-stýrið ráddi fyri borgum í Afghanistan, máttu medarbeiðararnir hjá kvinnufelagsskapinum RAWA arbeiða í loyndum fyri ikki at verða avdúkaðar. Men hóast tvey ár eru liðin, síðani talibanararnir vórðu riknir frá, er einki broytt. Tær noyðast framvegis at fjala seg og at virka í loyndum, tí stýrið í Kabul góðtekur ikki atfinningar teirra.

- Sjálvt um Taliban-stýrið nýttu tær strongu sharialógirnar, høvdu kvinnur, sum hildu seg til teirra lógir og reglur, eina ávísa trygd. Tá fingu kvinnur, sum gingu í burka, frið, soleiðis er ikki longur. Nú eru eisini tær fyri ágangi. Fleiri verða burturfluttar, og neyðtøkurnar økjast eisini, sigur Sahar Saha hjá RAWA við indiska blaðið The Asian Age.

Kvinnmufelagsskapurin vil vera við, at serliga menn hjá fyrrverandi krígsharranum Abdul Rashid Dostum fara illa við teimum afghansku kvinnunum. Sjálvur situr Dostum í stjórnini hjá Hamid Karzai, forseta, og hann verður roknaður sum trúgvur stuðul hjá USA.

Í RAWA eru kvinnurnar sera vónbrotnar av Karzai, forseta. Tær siga, at hann hevur ikki víst arbeiðinum hjá felagsskapinum nakra virðing, síðani hann tók við. Tær fýlast eisini á, at amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, herfyri umrøddi tann islamska krígsharran Ismail Khan við vøkrum orðum, sjálvt um mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch sigur hann vera ein fígginda hjá mannarættindunum.

- Ismail Khan er sekur í teimum flestu álopunum á kvinnur í dagsins Afghanistan, sigur Sahar Saba við The Asian Age.

# Sýtir fyri at fara frá

**Ófriðurin á Haiti hevur kravt meiri enn 50 mannalív, men forsetin vil ikki leggja frá sær**

HAITI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

-Eg fari úr forsetaborgini tann 7. februar í 2006.

Tað er tað greiða svarið frá Jean-Bertrand Aristide, forseta, eftir at uppreistrarmenn hava tikið fleiri býir við kravi um, at forsetin skal fara frá. Uppreistrarmenninir halda uppá, at svik var uppií, tá forsetin vann valið í 2000, og teir skuldseta hann fyri umfatandi korrupsjón.

ST hevur sent eitt lið av eygleiðarum til Haiti at fylgja við gongdini, tí vandi er fyri, at ein partur av fólkinum kann líða hungur, heldur ófriðurin fram.

## Flogfør mundu stoytt saman

Tvey rutuflogfør hjá norsku flogfeløgunum Braathens og Widerøe vóru nær við at stoyta saman uppi yvir Brandbu norðan fyri Oslo seinasta summar. 148 ferðafólk vóru við teimum báðum flogførunum.

Tilburðurin var tann 3. juni. Eitt flogfar hjá Braathens var á veg úr Gardermoen-floghavnini í Oslo til Molde, meðan Widerøe-flogfarið var á veg úr Varnes til Torp. Sambært galdandi reglum skuldu í minsta lagi 9200 metrar vera ímillum flogførini, men ta einu løtuna vóru bara 3600 metrar ímillum tey, og tað er alt ov lítið, tá talan er um flogfør, sum flúgva fleiri hundrað kilometrar um tíman.

Eftirlitsmaðurin, sum hevði eftirlit við teimum báðum flogførunum, varnaðist sambært myndugleikunum ov seint, hvat var hent, men tað eydnaðist honum kortini at forða fyri einum samanstoyti. Undir kanningunum er komið fram, at eftirlitsmaðurin tosaði í telefon, meðan hann skuldi halda eygað við teimum báðum flogførunum.

## Læknatrot hóttir sjúkrahús

Tað gongst so illa at fáa læknar til tey donsku sjúkrahúsini, at sambært teimum serkønu verða ímillum 40 og 45 sjúkrahús í Danmark um eini seks ár. Í dag eru tey 70.

Ein kanning hjá heilsustýrinum vísir, at næsta ár verður tørvur á 2.000 serlæknum á teimum donsku sjúkrahúsunum. Í dag er talið 800. Tað eru serliga tey smáu sjúkrahúsini, sum hava ilt við at fáa læknar, og læknatrotið rakar tí tey serliga meint. Um orsaøkina til tað stóra læknatrotið sigur heilsustýrið, at ógvuliga fá fingu sær læknaútbúgving í áttatiárunum, og í dag er frágongdin líka stór sum tilgonmgdin.

Flestu læknar eru samdir um, at einasti máti at sleppa burtur úr trupulleikunum er at leggja smá sjúkrahús niður og at savna læknakreftirnar á nøkrum stórum sjúkrahúsum. Men hesin spurningurin er sera eymur politiskt, tí fólk vilja fegin varðveita tað sjúkrahús, sum tey hava.

## Nýggjur høgraflokkur

Tá val verður til ES-tingið í summar, fáa sviar høvi at velja ein nýggjan høgraflokk, sum fær heitið Junilistin. Flokkurin er fyri, at Svøríki verður verandi í ES, men krevur, at fleiri avgerðir skulu takast í Stockholm heldur enn í Bruxelles.

Millum teirra, sum longu hava sagt seg stuðla tann nýggja flokkin, eru fyrrverandi tjóðbankastjórin Bengt Wohlin, búskaparfrøðingurin Stefan de Vylder og vinnulívsmaðurin Sven Hagstromer. Sambært Stefan de Vylder vísti svenska fólkaatkvøðan í fjør um evruna, at sviar eru ímóti at lata ES fáa ov stórt vald á svenska búskaparpolitikkinum.

Nýggi svenski høgraflokkurin heldur eisini, at svensku myndugleikarnir skulu hava rætt til at seta passeftirlit aftur í gildi fyri at steðga rúsevnis- og tubbakssmugling ella mannahandli.

## Arafat leggur inn undir seg

Ísraelska blaðið Haaretz vil vera við, at palestinski forsetin, Yasser Arafat, hevur flutt einar 70 milliónir krónur á eina konto, sum kona hansara, Suha Arafat, eigur í einum fronskum banka. Suha Arafat býr í Fraklandi.

Fyrr hevur altjóða gjaldoyragrunnurin IMF sagt, at teir palestinsku sjálvsstýrismyndugleikarnir fluttu meiri enn hálva sætu milliard krónur til kontur í útlendskum bankum í árunum frá 1997 til 2003. Av hesum skal Suha Arafat hava fingið einar 70 milliónir krónur. Ein part av pengunum hevur hon brúkt til eitt og annað, men tað mesta stendur á bók, skrivar Haaretz.

Ameriksnaka sjónvarpið CBS heldur seg kunna prógva, at Yasser Arafat flytir konuni einar 600.000 krónur um mánaðin, og at pengarnir verða tiknir av búskaparhjálpini, sum teir palestinsku sjálvstýrismyndugleikarnir fáa frá altjóða samfelagnum. Palestinski fíggjarmálaráðharrin, Salam Fayad, hevur sagt, at málið skal kannast til botns.